

## Benitez: Vit stríðast til tað seinasta

Fyri 11. ferð í hesum kappingarári skoraði Liverpool í yvirtíðini, tá ið liðið vann 1-0 á Fulham leygardagin. Og tað er venjarin Rafael Benitez væl nøgdur við. - Vit avtala ikki at skora so seint, men vit ganga høgt uppí, at vit geva ikki upp. Vit stríðast til seiansta sekund, og tað gevur úrslit, sigur Benitez, sum rósar sínum spælarum fyri at verða í góðum formi og kunna spæla allan dystin við fullari ferð.

## Klinsmann skelkaður av stórtapi

FC Bayern var úti fyri sínum størsta tapi í sjey ár, tá ið nýggja oddaliðið í Týsklandi, Wolfsburg, vann heili 5-1 á Bayern leygardagin. - Hetta tapið rakar okkum meint. Vit verða noyddir at líta frameftir og koma við einum heilt øðrum avriki í dystinum ímóti Barcelona, segði ein skelkaður Jurgen Klinsmann, venjari, eftir stórtapið. Bayern og Barcelona spæla fjórðingsfinalu í Champions League í vikuni.

NSÍ-KÍ 1-1 (0-1):

# Unglingar stóðu landsliðsspælarum kurl

NSÍ

KÍ

**Ágrýtna og óroynda KÍ liðið megnaði at stríða seg til stig á útivølli ímóti NSÍ, sum serliga í 1. hálvleiki tóktist fjáltursstungið**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Fer KÍ at megna at halda tørn um plássið í bestu deildini, og fer NSÍ at megna at bjóða seg fram í kappingini um FM heitið. Soleiðis hevur verið spurt og fregnast undan kappingarbyrjan. Og tað er ikki so undarligt, at tað hevur verið roknað við, at heiðamenn skulu kappast millum teir bestu, og at KÍ skal stríðast fyri at varðveita plássið í deildini:

Á NSÍ liðnum eru 4-5 landsliðsspælarar, og teir flestu av hinum hava týdningarmiklu royndirnar. Á KÍ liðnum er 38 ára gamli Jákup Mikkelsen í málinum, og 31 ára gamli Heðin á Lakjuni á miðvøllinum – viðhvørt ytstur í høgru og so í hinum borðinum. Annar av brandunum í miðverjuni, Oddmar á Lakjuni, er 22. Allir hinir eru yngri enn so.

Leygarkvøldið hittust hesi bæði liðini við Løkin í Runavík. Hvussu tað fer at tørna út fer tíðin at vísa, men avrikið og úrslitið leygarkvøldið góvu ábendingum, at tað er ikki sjálvsagt, at KÍ skal stríðast í botninum, og at NSÍ er FM kandidatur.

Óroynduklaksvíkingarnir høvdu hug at seta dagsskránna í 1. hálvleiki. Eitt sindur fjáltursstungnir tóktust teir at vera, men sum tíðin leið, tordu teir alt betri at vísa, at teir duga at spæla fótbólt. Alla tíðina stríddust teir sum fyri lívinum, og tað var týdningarmikið fyri teir at vinna nógvar returbóltar.

Heimaliðið hevði ilt við at finna rætta girið. Á miðvøllinum vóru ov nógvir ov lítið ágangandi, í álopspartinum vóru teir ikki hugflogsríkir, og í verjuni vóru teir ikki so sannførandi.

KÍ var disiplinerað: í verjupartinum vóru teir tættir og avgjørdir, og tá ið teir høvdu fingið fatur á bóltinum, gjørdu teir skjótt av. Jógvan Isaksen var tryggur í miðverjuni, John Hammer gekk undan í stríðnum á miðvøllinum, og Kristoffur Jakobsen, sum var einsamallur í fremstu røð, lúrdi alla tíðina eftir møguleikanum.

Tríggjar minuttir fyri steðgin fekk Kristoffur møguleikan. Heðin á Lakjuni spældi flatt og snilt og neyvt inn um miðverjuna, álopsspælarin fekk bóltin væl við sær og setti hann framvið Meinhardi Joensen í NSÍ málinum.



*Unga KÍ-liðið fekk eina fína byrjan, tá tað útivølli eydnaðist at fáa stig við sær í dystinum móti NSÍ*
*savnsmynd*

### Meiri ferð á

Eftir steðgin, tá ið Jann Ingi Petersen var komin inn á sentrala miðvøllin at stuðla Boga Løkin og Høgna Madsen, var tað týðuligt, at NSÍ royndi at fáa ferðina upp. Spælararnir fluttu seg betri fyri hvørjum øðrum, og teir royndu oftari at spæla fyrstu ferð. Sendingarnar vóru ikki altíð so neyvar, men viðhvørt eydnaðist tað at fáa teir bláu at renna aftaná, og tíggju minuttir eftir hvíldina eydnaðist tað at javna:

Fremsti klaksvíkingurin misti bóltin, tá ið liðið var á veg fram, Hjalgrím Elttør var staddur í vinstru, tá ið hann tamdi og bjóðaði sínum bygdarmonnum av. Tvær ferðir spældi hann eitt tvey, og tá ið hann var komin inn um verjuna eitt sindur í høgru, setti hann bóltin framvið Jákupi Mikkelsen.

Málið tóktist seta mót í teir gulu, og tað kundi kanska roknast við, at teir óroyndu bláu fóru at fara niður við nakkanum. Men soleiðis tørnaði tað ikki út. Klaksvíkingarnir arbeiddu fyri lívinum, og tað eydnaðist at halda tørn, hóast teir síðstu løtuna vóru sperdir. Karoly Potemkin, sum ikki flutti seg nógv, hevði risa møguleika at skora eftir horna úr vinstru, men hann rakti ikki bóltin, og stutt áðrenn hann varð tikin út, sendi hann bóltin í stólpan aftanfyri Jákup Mikkelsen.

Tá ið fíni dómarin hevði bríkslað fyri síðstu ferð, kendist tað bæði á og kring vøllin sum um, at klaksvíkingar høvdu vunnið eitt stig, og at NSÍ hevði tapt tvey stig. Unglingarnir høvdu staðið landsliðsspælarunum kurl!

## Heðin hevur álit á ungu monnunum

31 ára gamli superveteranurin, Heðin á Lakjuni, var fegin um, at tað hevði eydnast honum og KÍ liðfeløgunum at hava úrtøku við sær úr Runavík:

- Ungu menninir hava verið sera ágrýtnir undir venjing, og nú vístu teir, at teir megnaðu at standa seg í fyrsta landskappingardystinum. Vit vóna altíð at vinna øll stigini, men tað plagar ofta at vera strevið í Runavík, og sum fyritreytirnar vóru, so eru vit nøgdir við eitt stig, sigur Heðin á Lakjuni.

Umframt Jákup Mikkelsen og Heðin á Lakjuni eru tríggir aðrir veteranar á KÍ liðnum. Allan Joensen og Arnold Joensen vórðu skiftir inn, meðan Jan Andreasen hvørki var á vøllinum ella á beinkinum. Hann var skaddur, men teir rokna við, at hann verður tøkur hósdagin, tá ið 07 Vestur fer at spæla steypadyst í Klaksvík.

-jh

## Hjalgrím ikki nøgdur við ferðina

Í NSÍ leguni vóru teir ikki nøgdir við úrtøkuna, og teir hildu, at eftir 2. hálvleik kundu teir gott havt tryggjað sær øll stigini. Teir hildu seg eisini vita, hvør orsøkin var til, at tað – serliga í 1. hálvleiki – ikki hekk so væl saman hjá heimaliðnum:

- Ferðin var ov lág, og í 1. hálvleiki megnaðu vit ikki at skipa spælið fram eftir jørðini. Hetta tosaðu vit um í steðginum, og í 2. hálvleiki varð tað væl betri. Tá fingu vit eitt mál, og um vit vóru eitt sindur hepnari, so kundu vit havt vunnið øll stigini, tí vit høvdu møguleikar til tað, heldur NSÍ málskjúttin, sum vónar, at tað í steypadystinum ímóti HB í Gundadali hósdagin fer at eydnast at byggja víðari á 2. hálvleik.

-jh